

# Leys størv

### Pedagogur til Býlingshúsið Inni á Gøtu

Søkt verður eftir einum pedagogi at arbeiða 40 tímar um vikuna at byrja 1. oktober 2006 ella eftir nærri avtalu.

Umsóknarfreist: Mánadagin 4. september 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir skulu sendast til Býlingshúsið Inni á Gøtu, Ovaragøta 30 B, FO-188 Hoyvík.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poulu Ejdesgaard, stovnsleiðara, tlf. 317701.

### Pedagogar til Dagstovnin í Løkjatúni

Søkt verður eftir tveimum pedagogum at arbeiða 25-30 tímar um vikuna at byrja skjótast til ber.

Umsóknarfreist: Mánadagin 28. august 2006.

Setanarviðurskifti: Størvini verða sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Umsóknir skulu sendast til Dagstovnin í Løkjatúni, Løkjatún 5, FO-160 Argir.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Anniku Johannessen, stovnsleiðara, tlf. 302390.

### Reingerðarfólk til Kommunuskúlan

Søkt verður eftir reingerðarfólki at arbeiða frá kl.14 -17 gerandisdagar, at byrja skjótast gjørligt ella eftir avtalu.

Umsóknarfreist: Mánadagin 28. august 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála millum Havnar Arbeiðskvinnufelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Umsóknir skulu sendast til Kommunuskúlan í Havn, Tórsgøta 25, FO-100 Tórshavn. Viðmerk „reingerðingsfólk".

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til húsavørðin, tlf. 212383.

### Bilførari til rottangatænastuna

Kommunala Brennistøðin søkir bilførara til rottangabilin. Starvið er tíðaravmarkað til 3 mánaðir, tó kann gerast talan um fast starv.

Umsóknarfreist: Mánadagin 28. august 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært avtalu við Havnar Arbeiðsmannafelag.

Umsóknir skulu sendast til Tórshavnar kommunu. Viðmerk „Bilførari til rottangatænastuna".

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bárð Michelsen, deildarleiðara, tlf 302040 ella Janus Isfeldt, deildarleiðara á starvsfólkadeildini, tlf. 302010.

### Húsavørður til Kommunuskúlan

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir húsavørði til Tórshavnar Kommunuskúla.

Umsóknarfreist: Fríggjadagin 1. september 2006.

Setanarviðurskifti: Starvið verður sett sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu sendast til Tórshavnar kommunu. Viðmerk á umsóknina "skúlavørður".

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hanus Joensen, skúlastjóra, tlf. 302580 ella Eivind Danielsen, leiðara á húsaumsitingini, tlf. 302010.

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

www.torshavn.fo er at síggja á Býarbókasavninum, í Snarskivuni og í Kunningarstovuni

**Tórshavnar kommuna**



# Skeiðsdepilin

FØROYA HANDILSSKÚLI

TEKNISKI SKÚLIN

## Heystskrá 2006

### Alment innlit — 7. sept., kl. 9-16

**Endamálið er at fáa eina greiða fatan av lógini um innlit í fyrisitingina.**
Innlitslógin verður viðgjørd og útgreinað. Hetta fevnir m.a. um:

- Lógarøkið hvat er fevnt av lógini? - Skjalahugtakið sambært innlitslógini
- Skyldan at skriva upp - Rætturin til skjalainnlit
- Tagnarskylda avmarking av rættinum til innlit
- Avgerðin fráboðan, grundgeving og kæruvegleiðing

**Skeiðleiðsla: Johnhard Klettheyggj, løgfr.**
**Tilmelding: áðrenn 24. august 2006**

### Fyrisitingarlógin/Málsviðgerð o.a. — 19. og 20. sept. kl. 9-16

**Málsviðgerðarreglurnar í Fyrisitingarlógini verða viðgjørdar:**

- Lógarøki hvat fevnir fyrisitingarlógin um? - Reglurnar um vegleiðing, umboðan og ógegni
- Partshoyring, rætturin at geva ummæli, grundgeving, kæruvegleiðing
- Tagnarskylda, avhandan av trúnaðarligum upplýsingum - Reglurnar um partsinnlit

**Skeiðleiðsla: Petur Elias Nielsen og Johnhard Klettheyggj, løgfr.**
**Tilmelding: áðrenn 5. september 2006**

### Dugir tú at samskifta? — 30. og 31. okt. kl. 9-16

**Hetta er skeiðið, sum rykkir ullina úr munninum og vendir stíla-skrivingini á høvdið.**
Bølir tú uppi yvir skrivligum uppgávum? Fært tú ikki boðskapin ordiliga fram í brøvum? Gerast teldupostarnir ov drúgvir? Taka teir ov langa tíð? Og hvussu er, tá tú skalt reisa teg og siga nøkur orð í einari mannfjøld? Firvaldar í búkinum? Dettur tann svarti "klappurin" niður fyri eyguni?

Á skeiðnum fæst innlit í, hvat samskifti er, og dentur verður lagdur á munagott samskifti, har boðskapurin og móttakarin eru í miðdeplinum. Tú hevur kjansin at broyta tín skrivihátt, og tá skeiðið er liðugt, dugir tú rímiliga væl at bera tíni sjónarmið fram munnliga
**Skeiðleiðsla: Per Højgaard, journalistur**
**Tilmelding: áðrenn 16. oktober 2006**

### Tá ið journalisturin gerst fíggindi! — 21. og 22. sept. kl. 9-16

**Hvat liggur til grund fyri hansara kritiska vinkli.**
Nógv fólk kenna seg illa viðfarnan av fjølmiðlunum. Endamálið er at geva eina fatan av journalistiska handverkinum. Farið verður eisini djúpt hvørji rættindi keldan hevur, tá ið ein journalistur bankar uppá dyrnar.

Skeiðið er ætlað øllum teimum, ið á ein ella annan hátt hava við fjølmiðlarnar at gera. Lands- og kommunalpolitikkarar, fólk innan almenna fyrisiting, vinnulívsfólk og onnur, sum ynskja at vita, hvussu ein journalistur fakliga hugsar.
**Skeiðleiðsla: Jústinus L. Eidesgaard, journalistur**
**Tilmelding: áðrenn 7. september 2006**

### Persónsupplýsingarlógin — 2. og 3. nov. kl. 9-16

**-og persónsdátuvernd á arbeiðsplássinum**
Greitt verður frá skyldum og rættindum í starvsviðurskiftum, tá tað snýr seg um skráseting av persónsupplýsingum.

Lógin verður gjøgnumgingin. Dømi verða tikin frá donskum og norskum viðurskiftum og avgerðir í dátueftirlitið teirra.Útgangsstøðið er Persónsupplýsingarlógin, men hugt verður eisini at aðrari lóggávu á økinum t.d. revsilógini, javnstøðulógini og mannarættindasáttmálanum.
**Skeiðleiðsla: Ingunn Eiriksdóttir, løgfr.**
**Tilmelding: áðrenn 19. oktober 2006**

**Lesið meira á *www.skeidsdepilin.fo*, tilmeldast kann á heimasíðuni.**

Marknagilsvegur 75, Postrúm 3239, 110 Tórshavn
tel 318813, Fax 313374, info@skeidsdepilin.fo,
www.skeiðdsdepilin.fo